# Nógv mest brennivín

Hóast sølan av brennivíni er í afturgongd, er tað framvegis nógv tann størsti parturin av søluni í rúsuni.

Sølan av sprutti er framvegis 60% av allari søluni hjá Rúsuni og tað er eisini tann sølan, sum gevur nógv størstan vinning.

Vinningurin hjá Rúsuni av at selja sprutt er 45% fyri hvønn litur av alkoholi, altso tá ið spruttið er umroknað til 100% alkohol.

Tá ið sølan av sprutti fellur, hevur tað sostatt eisini stóra ávirkan á vinningin hjá Rúsuni.

Tí er tað tórført hjá okkum at liva upp til kravið frá politiska myndugleikanum um, at vit skulu hava eitt ávíst avlop.

– Tað hava vit klára væl, sigur Elsa Maria Olsen, stjóri í Rúsuni

Myndugleikarnir kravdu í 2009, at vit skuldu hava 11,8 milliónir, men í ár var kravið frá politiska myndugleikanum, at vit avlopið skuldi hækkast upp í 16,8 milliónir, tað ein vøkstur upp á 47% - 48%.

– Tað verður ein tórfør uppgáva at hækka avlopið fimm mllíónir, tí tíðirnar eru ringar og samstundis hevur príshækkingin í heyst havt sera stóra ávirkan við tað, at sølan er minkað.

– Í góðum tíðum hevði príshækkingin helst ført til hægri vinning, men í ringum tíðum førir hon til minni sølu og minni vinning.

Eisini landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur ásannað, at tað verður tórført hjá Rúsuni at liva upp til avlopskravið og tí hevur hann lækkað tað.

Í frágreiðingini, hann legði fyri Løgtingið í sambandi við uppskotið um fíggjarkarmin fyri næsta ár, staðfestir hann, at príshækkingin í heyst hevur tálman nýtsluni so nógv, at at inntøkurnar als ikki eru øktar samsvarandi. Tí verður neyðugt at lækka avlopskravið upp á 16,8 milliónir, niður í 14,8 milliónir krónur um árið.

## Brennivínið dýrkaði mest

*Tá ið Rúsan hækkaði prísirnar í heyst, dýrkaði ein fløska av brennivíni ímillum 11 og 12 krónur, ein fløska av borðvíni dýrkaði 75 oyru, ein øl við gullstyrki dýrkaði 33 oyru og ein veik øl dýrkaði seks ella sjey oyru*

# Miðalstyrkin fellur

Hesi seinastu árini hevur Rúsan ført ein miðvísan politikk við tí endamáli at tálma nýtsluna. Tað verður gjørt á trimum økjum: Atkomuligheitini, prísinum og hollari upplýsing og ráðgeving til viðskiftafólk.

Og hetta hevur borið frukt, tí hesi síðstu árini hevur miðalstyrkin á tí, sum Rúsan selur, verið støðugt fellandi, sigur Elsa Maria Olsen, stjóri.

Seinastu fýra árini hevur miðalstyrkin í tí, sum verður selt í Rúsuni, verið:

2006: 12,11%
2007: 11,80%
2008: 11,74%
2009: 11,72%

Hetta tekur stjórin í rúsini sum eitt greitt prógv um, at tálmingarherferðin hjá Rúsini eydnast.

*aki@sosialurin.fo*



# FØROYING FARA BUR SPRUTTI

**RÚSAN** Síðani Rúsan hækkaði prísirnar í heyst, er sølan nógv minkað og serliga er sølan av sprutti minkað munandi. Vit royna at læra føroyingar at drekka minni sprutt og heldur at njóta vín og øl, sigur stjórin í Rúsuni

Áki Bertholdsen

- Gongdin er heilt týðilig: Føroyingar drekka minni og minni av sprutti. Men so er sølan av víni vaksin ístaðin fyri.

Elsa Maria Olsen, stjóri í Rúsdrekkasølu Landsins er ikki í iva, at drekkimynstrið í Føroyum er við at broytast.

Men tað er eisini í fullum samsvari við endamálið hjá Rúsuni, sigur hon.

– Okkara endamál er avgjørt at broyta drykkivanarnar, so at rúsdrekka ikki bara verður keypt fyri at virkningum, men heldur fyri njótilsi, sigur hon.

### Drekka nógv minni

At drykkjuvanarnir broytast, slóð rættiliga ígjøgnum í heyst, táið prísirnir hækkaðu.

Serliga bleiv spruttið nógv dýrari, samstundis sum vín og øl bara dýrkaði eitt lítið vet.

Tað er heilt týðiligt, at hendan hækkingin hevur tálmað rúsdrekkanýtsluni munandi.

Rúsdrekkasølan hevur ikki havt stundir at dagføra tey nýggjastu hagtølini.

Men Elsa Maria Olsen sigur, at verður hugt eftir trimum teimum fyrstu ársfjórðingunum í fjør, var sølan eitt lítið vet hægri enn hon var í trimum teimum fyrstu ársfjórðingunum í 2008.

Vøksturin var 0,66%.

Men verður hugt eftir nýtsluni í seinasta ársfjórðingi í fjør, varð sølan minkað stívliga eitt prosent afturímóti síðsta ársfjórðingi í 2008.

Men verður sølan í januar og februar í ár samanborin við januar og februar í fjør, er minkingin enn størri.

– Í januar og í februar í ár, er samlaða sølan minkað eini 5%-6% aftur ímóti í sama tíðarskeiði í fjør.

Serliga er tað nýtslan av brennivíni, sum er munandi minkað síðani prísurin varð hækkaður í heyst minkað samstundis sum um at sølan av víni er vaksin eitt lítið sindur.

Tølini eru ikki klár enn, men stjórin metir, at brennivínssølan er minkað eini sjey, átta prosent teir báðar fyrstu mánaðirnar í ár aftur ímóti sama tíðarskeiði í fjør.

## » Sølan av brennivíni er munandi minkað

### Fegnast um gongdina

Elsa Maria Olsen sigur, at tað er ein tilvitaður og miðvísur politikkur hjá Rúsuni at minka um nýtsluna av rúsdrekka og tí fegnast hon um gongdina.

– Gamla drykkumentanin í Føroyum er at drekka fyri at fáa kenning. Mangan er talan um eina kjallaramentan, har fólk drekka í einsemi og ongin varnast, at ein trupulleiki er til staðar, fyrrenn fólk eru komin á glíðibreytina.

Tað er hendan hugburðin til rúsdrekka, sum Rúsan roynir at broyta.

– Í Rúsuni royna vit at menna eina góða drykkimentan, har tað ikki bara ræður at drekka seg skít, men har drykkjuvørurnar í størri mun verða tengdar saman við góðum mati og njótilsi.

– Tí er tað fult út í samsvari við okkara endamál, at sølan av brennivíni minkar og sølan av víni veksur, sigur Elsa Maria Olsen.